# Betur at lesa hart

Nýggjar kanningar vísa, at fólk, sum hava trupulleikar av at lesa, kunnu fáa góða hjálp, um onkur lesur fyri teimum einar 15 minuttir um dagin. Tað sigur danska felagið Skole og Samfund, sum í fleiri ár hevur víst á trupulleikar hjá børnum og ungum, sum hava lesitrupulleikar. Lise Ege Johansen hjá Skole og Samfund sigur við TV2, at upplestur gagnar ikki bara førleikanum at lesa, men er eisini góður fyri ta sosialu samveruna.



# Bankin ongar pengar

Tey nógvu banka- og pengaránini í Danmark hava fingið felagsskapin hjá donsku peningastovnunum at skjóta upp, at í framtíðini skulu bankarnir ikki hava reiðan pening í kassanum. Skulu fólk hava reiðan pening, skulu tey í sjálvtøkurnar, men vilja tey hava orð á bankan, skulu tey støkka inn á gólvið. Jørgen Vang Petersen hjá Nordea sigur við danska kringvarpið, DR, at í ár vera 20 Nordea-deildir umskipaðar, so tær fara ikki at hava reiðan pening inni.









Hesaferð var svimjingin skipað soleiðis, at svimjararnir kundu velja millum at svimja allan fjørðin, sum er 4.000 metrar, ella 1.000 metrar, sum byrjaði frá einum báti sunnan fyri Lundagjógv í Nólsoy.

Hóast fýra høvdu meldað til á hvørjum teini, svumu einans tríggir á longra teininum, og tveir á tí styttra.

Á longra teininum høvdu bert mannfólk meldað til, meðan bert konufólk høvdu meldað til á styttra teininum.

Longra teinin vann Evald Rasmussen við tíðini 1.32,41, nummar tvey gjørdist Erlendur Simonsen við tíðini 1.49,58 og nummar trý bleiv Kári Simonsen við tíðini 1.57,58

Hjá kvinnunum møttu bert tvær til start. Súsanna Skylv vann framman fyri Rannvá Djurholm.

Skoytast kann upp í, at Erlendur Simonsen – sum hin einasti – hevur verið við øll 11 árini.

## Taka støðu

Stevnan hepnaðist, sambært formanninum í Stuðulsnevndini fyri svimjinyl í Nólsoy, ógvuliga væl.

Trý nýggj tiltøk vóru á skránni. Fyrst spældi Havnar Hornorkestur til setanina, Frelsunarherurin hevði útimøti, og so varð skipað fyri kappsigling fyri vatnscootarar.

Tað luttóku bert tveir, men fleiri høvdu meldað til, so kanska hetta er eitt tiltak, sum fer at verða fast á

